# nnu brúdleypið



## FAKTA **UM VINNANDI PARIÐ**

**Nøvn:** Elna Høgenni og John A. Poulsen
**Giftast:** 10 juli
**Aldur:** 24 og 28
**Børn:** Tvey, Eyðun og Guðrið
**Bústaður:** Hoyvík. John er ættaður úr Vági og Elna úr Kaldbak.
**Starv:** John er portørur, og Elna er í barnsburðarfarloyvi
Tíð saman: 3,5 ár
**Hittust:** Tá tey høvdu náttarvakt á heiminum Vallalíð.
**Droyma um:** At fáa eina stóra familju, og nógv og tøtt børn

## Hvussu væl kenna tey hvønnannan?

**ELNA** OG **JOHN** ERU SAMD UM, AT TEY KENNA HVØNN ANNAN **SERA** VÆL. VIT VILDU KANNA UM HETTA **VERULIGA PASSAR**, OG TEY KENNA HVØNNANNAN LÍKA VÆL, SUM TEY **HALDA**...

### Spurningar til Elnu:

*Hvør er tí skóstødd?*
**Elna svarar:** 38
**John svarar:** 39

*Hvat er tín BH-stødd?*
**Elna svarar:** D-skál
**John svarar:** Ojø, er tað small, medium, large ella A, B, C ??? Eg rokni við at tað er C

*Hvør er tín favorittfilmur?*
**Elna svarar:** Braveheart
**John svarar:** Pearl Harbour

*Hvør er tín yndlings litur?*
**Elna svarar:** Lilla
**John svarar:** Lilla

*Hvat heldur tú er flovisligt?*
**Elna svarar:** Tá nógv fólk hyggja uppá meg
**John svarar:** Tá onkur rósar henni fyri okkurt gott, sum hon hevur gjørt

*Hvussu nógvar pengar brúkar tú uppá klæði um mánaðin?*
**Elna svarar:** Ikki nógv, tað er kanska einar 200-300 krónur.
**John svarar:** Ov nógv ... einar 1.000 krónur

### Spurningar til John:

*Snorkar tú?*
**John svarar:** Ja, tá eg eri troyttur
**Elna svarar:** Ja, heilt vilt. Onkutíð so hart, at hann vakjur børnini.

*Hvussu oftani bustar tú tenn?*
**John svarar:** Einar tvær ferðir um dagin
**Elna svarar:** Einar tríggjar ferðir um dagin, morgun og kvøld og oftani mitt um dagin eisini

*Hvør er tín favorittbók?*
**John svarar:** "Engle og demoner" av Dan Brown
**Elna svarar:** "DaVinci Mysteriet" ella onkra av teimum bøkrunum.

*Hvussu nógv vigar tú?*
**John svarar:** 88 kg
**Elna svarar:** 89 kg

*Nær fekk tú koyrikort?*
**John svarar:** Tá eg var 19 ár
**Elna svarar:** Tá hann var 18 ár

*Hvat ger tú fyri at vera romantiskur?*
**John svarar:** Tá geri eg ein góðan døgverða og borðreiði við einum glasi av reyðvíni til.
**Elna svarar:** Hann skrivar mær eitt lítið bræv og keypur okkurt, sum eg havi ynskt mær. Ella ger hann ein lekran døgverða, tað dugur hann sera væl.